gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Miðbýurin í Havn kortini varðveittur

*Oddagrein*

Tað er at fegnast um, at formansskapurin í løgtinginum kortini hevur slept ætlanini um at ríva niður gomlu tinghúsini og at byggja nýggjan stóran bygning í miðbýnum í Havn.

Formansskapurin hevur nú gjørt er av, at tinghúsini aftur skulu hava sniðið, tey høvdu eftir umvælingina í 1907, tá tey vórðu út- og umbygd.

Tað er ein sannroynd, at løgtingið ikki hevur havt nóg góðar arbeiðsumstøður, so einki forgjørt er í tí, at bøtt verður um hetta, so bæði politikarar og umsiting fáa virðiligar umstøður at arbeiða undir.

Men fleiri ivaspurningar vóru um hina verkætlanina, sum formansskapurin í fjør ætlaði at seta í verk: at byggja stóran modernaðan bygning, har tinghúsið hevur staðið seinastu hálvuaðru øldina. Fortíðin hevur so mangan sagt okkum, hvussu skeivt tað er at lata tað gamla falla fyri tíðarinnar tonn, heldur enn at nýta framskygni - og finna onkra frægari loysn, sum ikki forkemur tí gamla.

Nýggja tinghúsætlanin byggir eftir øllum at døma á hesa læru. Ætlanin er at lata tinghúsið verða karmin, skifta klædning, vindeygu og tak, so tinghúsið aftur fær ta útsjónd, tað hevði til umbyggingina seinast í sjeytiárunum. Tann útbyggingin var heldur miseydnað - í øllum førum, um ætlanin var at frá fram gamlan føroyskan byggisið.

Tá er byggingin í Tinganesi nakað heilt annað. Har hava tey bygt nýggj skivstovuhøli í gamlan stíl, so at gomlu handilshúsini, sum brunnu í grund í 1950, eru endurreist til mikið prýði fyri býin. Havnarfólk kunnu vera stolt av Tinganesi.

Miðbýurin í Havn er ov illa hagreiddur, tá tað ræðu um stórar bygningar, sum ikki eru bygdir við fyriliti. Slíkt er altíð trupult. Men at fríðka um og brúka verandi bygningar, er altíð frægari, enn at oyðileggja enn meira.

Ætlanirnar hjá Tórshavnar býráð, um fríðkan av gongugøtuni og økinum við Tinghúsið fara eisini at fríka munandi um miðbýin í Havn.

Havnarborgarar kunnu tí fegnast um, at miðbýurin verður varðveittur í tí gamla, hugnaliga stíli, vit eru von við…

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Fyri okkum, sum vilja taka ábyrgd!

Nú noyddust vit so aftur at hoyra hasa óhugnaligu niðurgering av føroyingum, ein málburður, sum lutar okkum øll sundur í ábyrgdarfullar og ábyrgarleysar føroyingar.

Her verður hugsað um miðvikuna í Útvarpi Føroya frá 12.07. í ár, sum varð endursend dagin eftir. Hesaferð var tað okkara løgmaður, sum annars altíð hevur ein siðiligan og fólkaligan atburð. Higartil hevur tað meira verið amboðskassin hjá varaløgmanni, sum hevur átt slíkar lýsingar.

Sum viðmerking til tey góðu fíggjarligu og búskaparligu viðurskiftini í Føroyum í dag, meðan vit enn eru í ríkisfelagsskapi, segði løgmaður at hann gleddist yvir støðuna, men legði so afturat: **»At hendan støðan er nakað serligt fyri okkum, sum vilja taka ábyrgd av hesum landinum«.**

**Hvør vísir ikki ábyrgd?**
Hóast spurningurin er settur óteljandi ferðir áður, fari eg tó enn einaferð at spyrja okkara løgmann, hvar vit finna tann føroyingin, sum ikki vil taka ábyrgd av okkara góða landi?

Er tað nú veruliga so spinnandi galið, at tað er meira ábyrgdarfult, at økja um okkara sjálvræði við pantseting og lántøku, heldur enn at gjalda, og serliga nú har okkara gjaldføri er sera gott?

Hví er tað ein ábyrgdarleysur politikkur at menna og útbyggja okkara sjálvstýri í mun til okkara egnu umsitingarligu og fíggjarligu førleikar?

**Hví ikki brúka góðu møguleikarnar?**
Umstøðurnar fyri at vísa veruliga ábyrgd við at útbyggja verandi sjálvstýri munandi, hava ongantíð verið so góðar sum júst nú, men tíverri hevur landsstýrið ikki gjørt brúk av hesum góða møguleika. Samgongan kennir bert eina loysn, og tað er loysing og fullveldi.

**Hin sjálvberandi búskapurin gloymdur**
Samgongan veit, at hon kann fáa fullveldi og loysing í ár um hon bert vil gjalda tað, sum ein slík avgerð kostar, men tað vil samgongan ikki. Hon setur ístaðin krøv um, at danir í 15 ár skulu gjalda okkum milliardaupphæddir fyri



okkara politisku avgerðir. Hetta krav setir samgongan við ávísing til avtaluna frá 10. juni 1998. Í hesi avtalu bindur danska stjórnin seg til at virka fyri, at minka blokkstuðulin á ein slíkan hátt, at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap.

Men hvat hevur samgongan gjørt fyri at fylgja hesi avtalu, og hvussu nógv hevur samgongan roynt at minka um blokkstuðulin? **Púrt einki!** Hon hevur ístaðin HÆKKAÐ blokkstuðulin, og hevur somuleiðis einki gjørt, sum ger tað lættari at lækka nevndu veiting – samanber ávaringarnar frá Bjarna Djurholm, fíggjarnevndarformanni.

**Danir skulu bert veita og gjalda**
Álitið hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum í Uttanlandsnevndini er hinvegin í góðum samsvari við umrøddu avtaluna frá 10. juni 1998. Um samgongan veruliga meinar nakað við at taka ábyrgd, ja so er bara at taka undir við nevnda áliti. Tað er sostatt heilt burturvið at geva dønum skuldina fyri, at samráðingarnar nú eru fastlæstar, tað má eisini sigast, at vera ein løgin samráðingarháttur, har tann eini parturin dugir væl at seta krøv, meðan hin partrin bert skal veita og gjalda, uttan at hava nakra ávirkan á tað, sum goldið verður fyri.

**Skulu teir hava fíggjarliga revsing?**
Slík mannagongd minnir mest um ein, ið er dømdur sekur og skal inn at sita og har umframt at gjalda milliardaupphædd í 15 ár til tann sakleysa.

Álvaratos, er hetta veruliga tað, sum ein tinglimur hjá Fólkaflokkinum nú kallar fyri eina virðiliga loysn?

*Tórshavn tann 18.07.*
**Trygvi F. Guttesen**

# Føroya fólk letur seg ikki taka av fótum!

Landsstýrið við síni propagandamaskinu aftan fyri seg roynir at fáa Føroya fólk at halda, at um bert skiftistíðin verður 15/20 ár, so heldur alt áfram sum higartil. – Tað gerst eitt skrall, siga búskaparfrøðingar. Landsstýrið brúkar seinastu veljarakanning sum prógv fyri at fólk ynskja loysing, sjálvt um hon í veruleikanum sigur tað øvugta.

Tað gerst eitt búskaparligt skrall í Føroyum, um loysingarætlanin hjá landsstýrinum verður framd, líkamikið um skiftistíðin verður 4 ella 15/20 ár. Hetta eru allir óheftir búskaparfrøðingar samdir um.

Sjálvandi gerst niðurgongdin til lækkaða livistøðið hjá føroyingum ógvusligari við 4 árum enn 15/20. Um livistøðið lækkar til bretskt støði, ella kanska portugisiskt, sum tað hevur verið sagt, er ilt at meta um, men vælferðarsamfelagið, sum vit kenna tað í dag, verður burtur, tað verður mist. Arbeiðsloysi og fólkaflyting verður fylgjan, stendur eisini í teimum búskaparmetingum, sum eru gjørdar í sambandi við loysingarætlanina.

**Seinasta veljarakanning**
Seinasta veljarakanning vísir, at 61,87% av Føroya fólki velja ríkisfelagsskap-



in. 27,53% siga nei, 10,60% vita ikki ella vilja ikki svara. Við øðrum orðum, sami stóri meiriluti fyri ríkisfelagsskapinum, sum vit hava sæð áður í kanningunum.

Kortini trumlar landsstýrið fram við sínar loysingarætlan, sum um tað hevur alt Føroya fólk aftan fyri seg. Rópt verður eftir ST at leggja uppí, ella øðrum triðja parti. Gud viti hvat ST hevði svarað, um tað varð spurt, eitt er í hvussu so er vist, hetta hevði gjørst søguligt eindømi í søgu ST.

Onki land í øllum heiminum hevur higartil biðið ST um hjálp fyri at lækka livistøðið í sínum egna landi, taka rættindi frá fólkinum og somuleiðis vælferðarsamfelagið. Tey høvdu ivaleyst flent í kíkið at landsstýrinum. Slíkir luksustrupulleikar eru sanniliga ikki hvønndagskostur hjá ST.

**Álvaratos**
Tíðin má vera komin til, at føroyingar siga at nú kann tað vera »well« við at landsstýrið spælir sær við lagnuni hjá føroyska fólkinum, vælferðarsamfelagnum og ríkisfelagsskapinum.

Nú kann tað vera »well« við at landsstýrið forpestar viðurskiftini millum fólkið í Føroyum og fólkið í Danmark og ríkinum annars.

Landsstýrið má gera sær greitt, at tað, sum stóri fólkaviljin stendur aftanfyri, er ein nýmótansgerð av viðurskiftunum í ríkisfelagsskapinum. Nýggj stjórnarskipan fyri Føroyar í ríkisfelagsskapinum.

Hetta kemur so týðuliga fram allastaðni úti millum fólk. Í veljarakanningum er heldur ongin ivi, fólk velja ríkisfelagsskapin.

**Føroya fólk letur seg ikki taka av fótum**
Føroya fólk hevur sæð, at loysing ella fullveldi hoyrir eini farnari tíð til, og landsstýrið arbeiðir fyri hesi farnu tíð. Føroya fólk hevur sæð, at framtíðin eitur samband og samvinna ímillum lond, sjálvstýrandi tjóðir og landspartar.

Tey hava sæð, at samstarv tvørtur um landamørk eyðkennir altjóðarpolitikk í dag, og í nógv teimum flestu førunum hevur tað økta frmleiðslu og búskaparvøkstur við sær. Tey hava sæð, at saman við Danmark og Grønlandi standa vit sterkari.

Tí, hvat meira kanst tú ynskja tær, enn at vera partur av einum størri ríki og samstundis stýra tínum egna landi?

Hesum vilja vit í Sambandsflokkinum fegin standa fyri og fremja tað í verki.

**Edmund Joensen**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



# Hava sjálvir skyldina av vánaligu støðuni

*Í juli mánaði taka nærum allir kommunulæknarnir sær summarfrí, so sera torført er at fáa læknahjálp. Sambært Almanna og Heilsumálastýrinum so vilja læknarnir ikki hava avloysarar*

Dia Midjord

Ringir tú á telefonsvararan hjá Anniku Olsen ella Dánjal Petur Højgaard, so fært tú at vita, at læknin er í summarfrí. Og tíverri fyri okkum í høvuðsstaðnum, so fara nærum allir kommunulæknarnir í feriu í senn.

Eitt skifti í hesum mánaðinum vóru bert tveir av teimum átta kommunulæknunum at hitta. Og var tað ringt at fáa fatur í lækna, so var støðan so mikið nógv verri hjá hesum báðum, ið stríddust bæði dag og nátt.

**Sjálvgjørt**
Maria á Dul, starvsfólkaleiðari í Almanna og Heilsumálastýrinum, sigur, at kommunulæknarnir mugu taka í egnan barm, nú nakrir teirra hava úr at gera.

– Allir kommunulæknar í Føroyum fingu eitt skriv í januar, har teir skuldu fráboða, nær teir fóru í feriu, og um teir skuldu hava avloysara, sigur Maria á Dul.

– Onkur teirra var ov seinur á sjóvarfallinum, so vit fingu einki svar fyrr enn ov seint varð. Hetta er tí at avloysararnir søkja fleiri staðni. Kortini eydnaðist at fáa avloysara til tveir av kommunulæknunum, sigur Maria á Dul.

Hon sigur víðari, at tað er torført at fáa avloysarar fyri allar kommunulæknarnar. Og tá Almanna og Heilsumálastýrið raðfestir avloysarar, so verður fyrst og fremst hugsað um útjaðaran. Hetta ger, at miðstaðarøkið mangan verður við skerdan lut.



*Av tí at kommunulæknarnir ikki fráboða í góðari tíð, nær teir fara í feriu, fáast ikki avloysarar. Hetta ger tað sera torført at fáa læknahjálp í juli og august*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fekk rivu í rútin

*Undir innflúgving til Kastrup klovnaði uttasta lagi á rútinum í stýrhúsinum á nýggja flogfarinum hjá Atlantic Airways*

Dia Midjord

Flogfarið var einar 8 kilometrar uppi, tá brádliga ein riva kom í rútin. Flogskiparin fylgdi fyriskipaðu reglunum, tá okkurt óvæntað hendir, og fleyg skjótt niður í eina trygdarhædd á slakar tríggjar kilometrar.

Hetta var orsøkin til, at fleiri av ferðafólkunum á ferðini til Keypmannahavnar tann 29. juni fingu eitt sindur ilt í oyruni.

**Hevur fleiri løg**
– Tað var eingin dramatikkur, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Hann sigur, at flogskiparin av trygdarávum skal flúgva niður, so trýstið verður útlíknað, um okkurt annað skuldi hent.

Rúturin í stýrhúsinum er sergjørdur við fleiri løgum, og tað skal nógv til, áðrenn rúturin fer allur sum ein.

– Flúgvarin bleiv standandi nátt yvir í Kastrup, og nýggjur rútur bleiv ísettur. Dagin eftir varð aftur flogið sum vanligt, sigur Magni Arge.

**Hent fyrr**
Tummas Jacobsen, tekniskur leiðari hjá Atlantic Airways, sigur, at rúturin í stýrhúsinum er einar 3 sentimetrar tjúkkur.

– Tað er loyvt at flúgva, hóast ein riva kemur í rútin. Men vit valdu at skifta rútin beinanveg. Tað er hent onkuntíð fyrr, at ein riva er komin í okkurt av løgunum, sigur Tummas Jacobsen.

Vit spyrja, hvat hendir um allur rúturin brotnar?

– Tá fer trýstið í stýrhúsinum, og flogskiparin verður sogin út, um hann ikki er væl íbundin, sigur Tummas Jacobsen.

Hann leggur aftrat, at tá skal veita illa við.

– Eg veit ikki um, at rútur nakrantíð er brotnaður á flogi, sigur tekniski leiðarin hjá Atlantic Airways.

team 85 · 31 65 11

**Shetland Cruise 2000 summarið**
www.smyril-line.fo
**SMYRIL LINE**
**Tel 34 59 00**

**Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag**



**Gisting á hotelli**
*úr einans …* **864,-** fyri hvønn (í lágárstíð)



**Gisting á vallaraheimi**
*úr einans …* **691,-** fyri hvønn (í lágárstíð)



**Privat gisting**
*úr einans …* **819,-** fyri hvønn (í lágárstíð)

**Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30**

***Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu***

***Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.***



**Ring og hoyr nærri !**

**e-mail: booking@smyril-line.fo**